Er lýsingin umbiðin fleiri ferðir og
**Luturin seldur ella tað eftirlýsta fingið**
ber til at ringja 11820 og fáa lýsingina tikna úr »Lýsingartorginum« – vilja tit ikki órógvast av fólki, ið ringir til fánýtis.

**SOLARIUM**
til sølu.
Tlf. 15003, eftir kl. 16

**YNSKIST**
Monteringssett til bil til Panasonic NMT 450 fartelefon.
Tlf. 41047

**TIL SØLU**
2 M sveimiflogfar við 2 kanals fjarstýring og 5 m solarfilm, ikki heilt liðugur, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 56852

**ARBEIÐI YNSKIST**
hevur tú brúk fyri reingeringshjálp ella tílíkum, vil eg fegin hjálpa tær við tí.
Tlf. 19587

**YNSKIST**
Froskmannaútgerð ynskist til keyps. Má vera í góðum standi.
Tlf. 15877, best eftir kl. 18

**YNSKIST**
Ein »Bratter« bindimaskina ynskist til keyps.
Tlf. 73628

**FRYSTIANLEGG**
ynskist til keyps. Eisini hurð til frystirúm.
Tlf. 48271, um kvøldið

**YNSKIST**
Stór vekt (handilsvekt) ynskist til keyps.
Tlf. 48271, um kvøldið

**TIL SØLU**
Mintgrønt baðikar og bidé bíliga til sølu.
Tlf. 73199

á
**BLÁDÝPI**
gistir tú væl & bíliga.
Eisini hava vit serligar vetrar- & vikuskiftisprísir.
**BLÁDÝPI**
Dr. Jakobsensgøta 14–16
Tlf. 11951 Fax. 19451

**BILLUTIR**
útvegast til
FLEST ALLAR BILAR
**Fa. BILLUTIR**
Tlf. 21605 Fax. 21666

Ekstra Bladet

CHEFREDAKTØRER: SVEN GYLDENDAL (ADM.)
BENT FALBERT (ANSVARSHAVENDE)
I REDAKTIONEN: RUD KOFOED, HANS LARSEN
REDAKTIONSCHEFER:
SØREN JAKOBSEN, MOGENS BILLE, JAN JENSEN

RÅDHUSPLADSEN 37
1785 KØBENHAVN V
TLF. 33 11 13 13.
ÅBEN HELE DØGNET
(LUKKET LØRDAG KL. 24 TIL SØNDAG KL. 13)
TLFX. 33 14 10 00

NORDJYLLANDS-REDAKTIONEN
Slotspladsen 2
9000 Aalborg
TLF. 98 16 60 00
TLFX. 98 13 91 19

VESTJYLLANDS-REDAKTIONEN
Torvet 16, 2.
6700 Esbjerg
TLF. 75 13 65 11
TLFX. 75 13 65 54

MIDTJYLLANDS-REDAKTIONEN
Frederiksgade 33
8000 Århus C
TLF. 86 13 27 44
TLFX. 86 13 27 24

SYD- OG SØNDERJYLL. REDAKTION
Bundgårdsvej 45
Erritsø
7000 Fredericia
TLF. 75 94 03 11
TLFX. 75 94 02 87

FYNS-REDAKTIONEN
L. Dansestræde 12
5000 Odense C
TLF. 66 11 01 11
TLFX. 66 12 21 11

SJÆLLANDS-REDAKTIONEN
Ramsherred 6,
4700 Næstved
TLF. 53 72 50 00
TLFX. 55 77 22

# UGENS BEDSTE TILBUD




SPIDSBORGERNE på Færøerne er nødt til at gå tur hver dag – for at aflive begrundede rygter om, at de sidder fængslet. Så omfattende er den svindelsag, der for alvor har kastet søgelyset på det lille øsamfund og dets omgang med penge. Samfundets top har været dybt involveret. Nogle af dem er sigtede, andre har bare vidst besked, men ikke haft mulighed for at deltage i svindlen. Og ingen har haft interesse i en opklaring, for man regnede helt sikkert med, at regningen endte i Danmark.

VI BØR TAGE KONSEKVENSEN af vor manglende vilje til at rydde op i det færøske anliggender. Sæt dog øerne til salg. Det har vi gjort før, når urentable øer kun var til udgift på finansloven, men det var godt nok på et tidspunkt, hvor vi havde så handlekraftige ministre som C.Th. Zahle og Thorvald Stauning. De sko kan Marianne Jelved og Poul Nyrup Rasmussen ikke fylde ud.

PROFESSOR ISI FOIGHEL siger i dag til Ekstra Bladet, at det ikke er så

*Ekstra Blaðið heldur fram við síni herferð móti føroyingum*

# Mælir í oddagrein til at seta Føroyar á sølulistan


DET VAR FOR LET

*Korruption er en naturlig ting på Færøerne, fordi der altid er andre til at betale*

INTET MERE KAN CHOKERE

Isi Foighel:
VI SKAL HOLDE SAMMEN

Færøerne

AF LARS NORMANN

*Einki mark tykist vera fyri herferðini hjá Ekstra Bladnum. Leygardagin leggur blaðið enn einaferð eftir føroyingum við at mæla til at seta Føroyar á sølulistan*

Fleiri donsk bløð hava í hesum døgum síni umboð í Føroyum, so tey frá fremstu áskoðaraplássunum kunnu fylgja við í, hvat hendir her á landi – serliga við atliti til ta stóru húsarannsóknina, ið politiið gjørdi í farnu viku.

Millum bløðini, ið hava sent síni umboð til Føroya, er Ekstra Bladið, ið aftur hesaferð hevur sent Carl Johan Albrechtsen hendanvegin saman við einum myndamanni.

At kalla hvørja ferð, tá hann hevur verið í Føroyum, hevur Ekstra Bladið á høvuðsredaktiónini á Ráðhúsplássinum sett saman eina oddagrein, ið sker alt tað út í papp, ið hesin Carl Johan Albrechtsen hevur lagt lunnar undir við sínum »journalistikki«.

So er eisini hesaferð.

Leygardagin hevur blaðið stóra oddagrein, ið snýr seg um at seta Føroyar til sølu í Statstidende.

»Ugens bedste tilbud« er yvirskriftin í oddagreinini, ið týðiliga fortelur at rokningin fyri alt tað, sum fer fram í Føroyum, endar hjá donsku skattaborgarunum.

Hesaferð er talan um rokningina fyri uppruddingararbeiðið, ið politiið fór undir í farnu viku, tá húsarannsóknir vórðu gjørdar í Føroyum, Danmark og yviri í Grønlandi.

»Vi bør tage konsekvensen af vor manglende vilje til at rydde op i de færøske anliggender. Sæt dog øerne til salg. Det har vi gjort før, når urentable øer kun var til udgift på finansloven, men det var godt nok på et tidspunkt, hvor vi havde så handledygtige ministre som C. Th. Zahle og Thorvald Stauning. De sko kan Marianne Jelved og Poul Nyrup Rasmussen ikke fylde ud,« skrivar bladið í oddagreinini.

Føroyar verða har samanbornar við Vesturindisku Oyggjarnar, ið danir seldu í 1916, eftir at fólkaatkvøða hevði verið um tað.

Bladið mælir tó til, at danir sleppa sær av við føroyingar á ein vakran hátt – við at geva føroyingum forkeypsrætt til Føroyar.

»Når landet *(Danmark, blðm.)* i den grad stander i våde, så bør vi selvfølgelig stoppe det ødsle atlanteventyr, og vi skal gøre det på en pæn måde. Giv dog færingerne forkøbsret. De vil sikkert være interesserede i at byde mere end Nordkorea,« endar oddagreinin. **hj.**